


*Nr. 13* **28. juni 2015** **75. árg.**

# Hin sterka hondin

Størsta undrið, sum Guds fólk upplivdi í fyrndini, var at tey vórðu leidd burtur úr trælahúsinum í Egyptalandi. Móses gjørdist oddamaðurin fyri hesi ótrúligu frígeringini. Men tað var Guds hond, sum stýrdi.

Yvir fyri Gudi ert tú lítil og hjálparleysur. Lít upp til hansara, tín velduga faðir, um tú ynskir eitt undur í lívi tínum.

Tá ið lítla barnið leggur sína mjúku hond í tína, er barnsins hond líka sterk sum tín. Tí tað ert tú, sum leiðir barnið. Soleiðis er eisini, tá ið tú leggur tína hond í hondina á himmalska faðiri tínum. Tá verður tú líka so sterkur sum hann er, tí hann leiðir teg, og tú fylgir honum eftir.

Harrin segði í fyrndini við fólk sítt. “Av tí at Harrin elskaði tykkum......leiddi hann tykkum við sterkari hond og loysti tykkum út úr trælahúsinum.” (5.Mós. 7,8)

*Eg legði alt á Jesus, ogn og mál,*
*allar mínar syndir, lív og sál,*
*trúareygað sá hans deyðakor,*
*“Fyri teg eg doyði,” er hans orð;*
*mær frá hjarta byrðan burtur svann,*
*frið eg fann.*

# Rokna við himmalinum

Norska sangskaldið og bóndin Per Nordsletten kom fyri mongum árum síðani heim á garð sín á Lesja og sá, at løðan var brunnin í grund. Onga trygging hevði hann. Hetta var ein stórur missur. Tungur í huga stóð hann í toftunum.

Men so hendi okkurt. Hann tók himmalin við inn í hesa støðuna. Hann vendi sál og sinni móti Gudi, ið hevur skapað alt, og sum ikki svíkur børn síni her á jørð.

Per Nordsletten segði: "Onki av tí, sum eg skal hava við mær, brann." Tað er eisini sannleikin, tá ið saman um kemur. Harvið fekk hann frið mitt í ólukkuni.

Tak tú eisini himmalin við inn í tað, sum tú stúrir fyri. Tak í dag eitt gott gudsorð við tær út í gerandisdagin: "Hjálp mín frá Harranum kemur, skapara himmals og jarðar. (Sálmur 121,2).

# Upptornað?

Ein kona talaði á visjon Norge. Sendingin var frá stevnuni hjá "Kvinner i nettverk". Hon greiddi soleiðis frá:

"Tá ið vit vóru trúboðarar í Afrika, lærdi eg skjótt, at tað var av alstórum týdningi, at eg drakk ríkiligt av vatni ella te á morgni, áðrenn vit fóru út, tí annars kundi eg koma illa fyri. Eg kundi svíma, ja, var heilt galið, kundi eg doygja. Tað er so skjótt at hydrera – torna upp – í øllum hitanum í Afrika.

Tað sama kann henda andaliga. Lesa vit ikki í Guds orði, Bíbliuni, so torna vit upp innan. Uppturkað kristin verða ofta sum ein kaktus, tey stinga og prika øll, sum koma í nánd av teimum. Nei, latið okkum fylla okkum við Guds orði, sum er so ríkt og undurfult. Tá verða vit ikki stingandi kaktusar, men plantur, sum bera tær leskiligu fruktirnar: "Men ávøkstur andans er: kærleiki, gleði, friður, langmóð, mildi, góðvild, trúskapur, spakføri, fráhald." Gal. 5,22.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Kristindómurin er eingin religión. Hann er heilt einfalt SANNLEIKIN. "... og hetta hevur Hann (t.e. Gud) prógvað øllum við at reisa Hann (Jesus) upp frá hinum deyðu." (Áps. 17,31 V.D.) Gud hevur givið okkum eitt fullgott prógv. Jesus er krúnvitnið. Tað er eitt søguligt faktum!

*e.c.* ums.

# *Tú ert okkurt heilt serligt*

*"... kærleiki mín skal ikki frá tær víkja ..." Jes. 54,10.*

Kina-trúboðarin John Bentley gav øllum børnunum á einum kinesiskum barnaheimi bókina hjá Max Lucado, sum æt "You are Special". Í Kina taka tey dreingir fram um gentur. Røsk smábørn eru hægri í metum enn ússalig. Sannleikin er tann, at børn, sum eru talu- ella hoyrnarbrekað hava ógvuliga smáar møguleikar at fáa eina sunna og virkna tilveru. Allur boðskapur, sum tey fáa úr søguni og mentanini, ljóðar: Tú hevur einki at týða.

Í bókini hjá Lucado verður greitt frá Punchinello, einum trædrongi í einari bygd við træfólki. Bygdarfólki setti stjørnur á "vinnarar" og blettir á "taparar". Punchinello hevði so nógvar blettir, og fólk góvu honum blettir uttan nakra orsøk. Men tá ið hann hitti Eli, sum hevði gjørt hann, staðfesti Eli, at hann skuldi einki leggja í, hvat ið onnur hildu um hann. "Eg skapti teg," segði Eli, "og eg geri einki mistak." Slík orð hevði Punchinello aldri hoyrt áður. Men tá ið hann gjørdi, sum Eli segði, fóru blettirnir at detta av Og tá ið børnini á barnaheiminum hoyrdu hesi orðini, fór teirra heimur at broytast.

John Bentley skrivar, hvussu tað var at lesa søguna fyri hesum børnum, og hvussu ómetalig ávirkanin var á tey, sum sótu og mest sum svølgdu hvørjum orði: "Tá ið tað gjøgnum lesturin gjørdist teimum greitt, at tey vóru okkurt serligt, rætt og slætt av tí at tey vóru skapt av einum kærleiksfullum skapara ... fóru øll at gráta – eisini lærarar teirra. Tað var sterkt."

Lat Bíbliu tína upp í dag, har fært tú Guds meining um teg og bygg síðani lív títt á hana. Tað er einasta meiningin, sum hevur nakað at siga! Harrin sigur: "Tí at um so fjøllini vikast, og heyggjarnir ridla, skal tó kærleiki mín ikki frá tær víkja..." Jes. 54,10

"... et Ord til Dagen"
*Effie Campbell* umsetti.

# Hin sterkasti mátturin

Ein teknilærari gav einaferð næmingum sínum eina uppgávu. Tey skuldu royna at tekna hitt sterkasta valdið, tey vistu um.

Úrslitið var ógvuliga ymiskt. Næmingarnir høvdu skilt uppgávuna á ymsan hátt. Ein næmingur hevði teknað tvær samanlagdar hendur í bøn.

*t.* týddi.

# *Á skriviborði Jesu*

Ein bygdaprestur arbeiddi ein dagin úti í urtagarðinum, og lítla dóttir hansara rann frá einum blómuteigi til annan og gleddist um tær vøkru blómurnar.

“Pápi, eru blómur í himlinum?” spurdi hon brádliga.

Pápi hennara var bæði gudrøkin og lærdur maður; men hesin spurningurin kom eitt sindur óvart. Hann hugsaði seg um eina løtu og svaraði: “Ja, har eru blómur, góða.”

“Men, pápi,” segði smágentan, “heldur tú, vit sleppa at henta nakrar blómur har?”

“Ja, tað haldi eg,” svaraði pápi hennara.

“Á, veitst tú, hvat eg so fari at gera, pápi?” segði gentan glað,” eg fari at henta eitt stórt og vakurt blómutyssi og seta tað í ein vasa, og so fari eg at seta hann inn á skriviborðið hjá Jesusi. So veit eg ikki, hvat hann sigur, tá ið hann kemur inn og sær hann.”

“Hann verður so grúuliga glaður og sigur: “Hetta hevur mín lítla Lisa gjørt.”

Pápi hennara tagdi stillisliga. Hann var bæði álvarsamur og glaður. Hann gleddist um lítlu dóttur sína, men hann hugsaði eisini um, hvussu lítið tað eyðkennir okkum kristnu, at vit vilja gera okkurt umframt tað, sum kravt verður av okkum – at vísa, hvussu høgt vit elska Harra og Frelsara okkara.

*t.* týddi.

---

Tá ið Jesus setir føturnar á Oljufjallið, fer alt Ísrael at standa rundan um hann skelvandi, tí tey høvdu sagt: “Latið blóð hansara koma yvir okkum og børn okkara!” Men tey koma at uppliva, at Jesus fyrigevur teimum, eins og Jósef fyrigav brøðrum sínum. Skrivað stendur, at eitt heilt fólk verður frelst eftir einum degi (Róm. 11,25-27).

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk/fo**

---

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74




*Nr. 14* | *12. juli 2015* | *75. árg.*

# Vit eru øll á ferð

*Haldið tykkum sjálvi í Guds kærleika, meðan tit bíða eftir várs harra Jesu Krists náði til ævigt lív.*

*Judas 21.*

Vit eru øll á ferð. Á veg til dagsins gerning ella á ferð móti náttarhvíldini. Á veg móti vikuskiftinum. Men vit eru eisini á ferð gjøgnum lív okkara. Summi hava mong ár framman fyri sær. Hjá øðrum er lítið eftir av lívsleiðini.

Á lívsleiðini gongur tað stundum við rúkandi ferð – gleðirnar og upplivingarnar eru mangar – tú hevur kanska nógv um at vera við arbeiði og við at ansa børnum. Aðrar tíðir steðgar lívið upp. Kanska sjúka ella annað forða tær og gera lívið torført.

Orðið her omanfyri eggjar okkum at halda fast við endamálið við lívi okkara, bæði tá ið vit hava nógv um at vera og alt gongur við, og tá ið dagarnir gerast tungir. Málið er ævinleikin heima hjá Gudi. Málið er eitt lív við ongum gráti og uttan alt ilt, og har gleðin og kærleikin fevna um alt, og Guds ljós skínur og gevur hita. Málið er ikki bara eitt dagatal og ár í hesum heimi, har gleði og sorg reika hvør um aðra. Málið hjá einum kristnum røkkur út um lívið her á jørð. Sjúka og deyði eru ikki endin á øllum. Tí í trúnni á Jesus eru vit í Guds sterku hond. Og vald hansara endar ikki við deyðanum. Jesus hevur vunnið á deyðanum og lagt okkum veg inn í ævinleikan. Tí hava vit í okkara seinasta tíma her á jørð enn eina framtíð fyri okkum.

Og henda guddómliga væntan um ævinleikan kann gjarna lita hugsanir okkara og geva okkum frið og frímóð til at liva eisini dagin í dag.

*Tá veit eg eygað einaferð*
*fær dýrdarsjón at sjá;*
*tá lívsins dagur endar her,*
*er endi neyðum á;*
*Guds riki stendur sólarskrýtt,*
*Krists kirkjulið sum brúður prýtt,*
*úr hvørji ætt tað komið er.*
*Hvør glaður sigurspálmar ber*
*og syngur hátt:*
*"Gud eigur allan mátt."*

# At síggja Jesus

*Vit vilja fegin fáa at síggja Jesus. Jóh. 12,21.*

Heiður veri honum fyri alt, sum hann hevur gjørt til reiðar til okkara í døgunum, sum koma og fyri alla ta hjálp, sum bíðar okkum! Tær signingarnar, sum okkum fara at verða fyri, liggja bæði langt inni í framtíðini og beint fyri framman. Frelsari okkara megnaði at síggja burtur frá krossinum fyri ta gleði, sum bíðaði honum longri frammi. Latið okkum líta upp til hansara til vit at enda standa á Umbroytingarfjallinum og eru før fyri at skoða alt land heilt út í blánandi sjónarringin. Onki í komandi tíðum skal tá kunna forða okkum at síggja kongin í allari dýrd síni. Latið okkum vera vís í, at vit síggja hann eina! Tá gerast eygu okkara so merkt av hesi sjón, at tey ikki duga at síggja nakað annað..

Eitt barn kom einaferð yvir til pápa sín og segði: "Pápi, hygg eina løtu at hasum gylta merkinum hinumegin vegin. Hygg síðani at grótvegginum og sig mær, hvat tú sært." "Eg síggi gullmerkið á grótvegginum."

Um vit hyggja leingi at Jesusi, kunna vit ikki hyggja at nøkrum øðrum, uttan at síggja eina endurspegling av honum. Alt, sum vit skoða, verður sum ein partur av honum.

*Ein borg mær hann er, har eg hvíla nú kann*
*sum skip í tí tryggastu havn;*
*hjá Jesusi eina mín sál hvílu fann,*
*mín friður er hansara navn,*
*hann sjálvur meg tók í sín favn.*

*Effie Campbell* umsetti.

# Verði vilji tín

At kunna siga av hjarta: “Verði vilji tín!” – sigur, at eitt menniskja hevur álit og trúgv á Gud, eins og  barnið hevur á faðir sín. Tá er ongin ótrygd og angist fyri, at vilji faðirsins skal bera nakað ónt við sær, ongin ótti fyri, at faðirin skal sleppa barninum.

Barnið hevur fingið hetta sterka álitið, meðan faðirin og barnið hava livað lívið saman. Barnið gevur alt upp í faðirsins hendur, tí tað veit, at ræður vilji faðirsins, so verður alt gott.

Verði vilji tín! Tá ið vit av hjarta hava lært at biðja hesa bønina, eru vit trygg, hóast vegurin er tungur at ganga, tí vit vita, at vegurin ber fram ímóti málinum. Og so gremja vit okkum ikki, um trupulleikar koma, tí vit vita, at fyri Guds vilja skal alt einaferð boyggja seg.

Ja, alt, sum Faðirin ger, ber eydnu við sær – enntá í tí førinum, tá ið Faðirin letur gleðiportrið aftur og letur sorgarportrið upp.

Verði vilji tín! Tað sinnið, sum av hjarta kann biðja hesa bønina, fáa vit bara frá Jesusi, sum í Getsemane stríddi hitt harða bønarstríðið og við deyðaangist í hjartanum bað: “Verði vilji tín!”

Vilji og sjálvsálit mugu verða brotin, áðrenn vit læra at sleppa øllum og barnsliga geva okkum upp í hendur Guds. Men tá ið vit eru komin so langt, so liggur lívsvegurin tryggur, og vit verða borin ígjøgnum sorg og mótgang.

*t.* týddi.

## Tá ið ein trúgvandi doyr: 1

*“... tit skulu ikki syrgja eins og hinir, sum ikki hava vón.” 1. Tess. 4,13.*

Okkara mentan ger deyðan til eitt evni, sum vit skulu skáka okkum undan ella tala við sorg um. Tá ið evnið verður borið upp á mál, royna enntá kristin at sleppa sær undan kúluni og fara at nýta onkra veika og kávandi myndatalu, sum als einki hevur við sakina at gera. Men Guds orð lýsir deyðan greiniliga og óttaleyst og sigur, at tann, sum trýr á Kristus hevur einki at óttast. “Men vit vilja ikki, brøður, at tit skulu vera óvitandi viðvíkjandi teimum, sum sovna burtur, fyri at tit ikki skulu syrgja eins og hinir, sum ikki hava vón.” Tá ið Gud talar um deyðan, talar hann altíð beinleiðis, ítøkiliga og upplívandi. “Dýrur er í Harrans eygum deyðin hjá dýrkarum hans.” Sálm. 116,15.

# Tá ið ein trúgvandi doyr: 2

*"... Gud skal við Jesusi leiða tey fram, sum sovnað eru burtur, saman við honum." 1. Tess. 4,14.*

Tá ið ræður um deyðan, verða vit menniskju býtt sundur í tveir bólkar: Tey, sum eru uttan vón, og tey, sum eru full av vón. Tey, sum eru uttan vón, halda ikki, at tey hava nakað at gleða seg til. Teirra missur kennist varandi – lívið og alt tað, sum er gott, er liðugt. Men tey, sum hava vón, hava alt at gleða seg til. Teirra missur er bara fyribils – hann er byrjanin til eitt ævigt lív, fult av Guds deiligastu gávum.

"Og nú, kæru brøður, vil eg, at tit skulu vita, hvat ið hendir við einum kristnum eftir deyðan, fyri at tit ikki skulu syrgja sum tey, ið onga vón eiga." (vers 13, Nýggj Ums.) Vón okkara kemur av, at vit kenna hesar sannleikar:

1) "Vit trúgva, at Jesus doyði, og síðani vendi aftur til lívið..." (vers 14) Øll vón byrjar við trúnni á, at Jesus doyði fyri syndir okkara og reis upp aftur fyri at tala søk okkara hjá Gudi.

2) Við tað at vit trúgva tí, trúgva vit eisini, at Jesus vendir aftur. Trúgvin á Kristi likamligu afturkomu sannførir okkum um, "... at Gud eisini vil føra øll kristin, sum eru deyð í trúnni á Kristus, aftur til lívið saman við tí upprisna Jesusi." (vers 14) Gud vil reisa okkum upp frá grøvini og taka okkum heim saman við Jesusi. Róm. 8,11.

Í tí løtuni vil hann "... umskapa okkara veika og deyðiliga likam og geva tí eina himmalska dýrd, so vit gerast sum hann ..." Fil. 3,21. Ongantíð aftur fært tú krabbamein, sukursjúku, hjartasjúkur, liðagikt, heilabløðing, lammilsi, brek, møði, veikleikar, sorgir, ótta, tunglyndi, freistingar, tú verður ongantíð niðurbundin av nøkrum, verður ongantíð við undirlutan, fært ikki samvitskubit, sjálvmorðstankar ella nakra sum helst aðra líðing. Tú fert at verða umskaptur fullkomiliga at líkjast Kristusi.
Er tað ikki undurfult?

"...et Ord til Dagen"
*Effie Campbell* umsetti.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk/fo**

---

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74